# Tórshavn – strembanin

BÝARÆTLAN

*Sámal Matras Kristiansen, samfelags-frøðingur við spesiali í býarplan-legging*



Hvat er ein góður býur? Tað er ikki ein einfaldur spurningur at svara, og kanska júst av teirri orsøk halda ymiskir fakbólkar, ið fáast við býir, at hesin spurningur er verdur at seta ferð eftir ferð.

Leygardagin 17. november hevði Føroya Arkitektafelag bjóðað inn til almennan fyrilestur í Nóatúni við heitinum *"Strategisk býarplanlegging í Evropa – hvat kann Havnin taka til sín"*. Human-geografurin Gilli Trónd, ið eisini hevur útbúgving í býarplanlegging úr Rotterdam, var gestarøðari, og hann legði upp til eitt kjak um, hvussu man kann hugsa býarplanlegging í høvuðsstaði Føroya av nýggjum.

Í hesi grein verða nøkur av teimum evnum, ið vórðu høvd á lofti á fyrilestrinum, viðgjørd. Talan er ikki um eitt referat av fyrilestrinum, men um eina egna viðgerð, ið tekur støði í arbeiðinum hjá øðrum. Talan er harvið fyrst og fremst um eina popularisering av fakinum býarplanlegging, men samstundis eisini eitt kjak um støðuna hjá Tórshavnar miðbýi. Nógv av tilfarinum í greinini er tískil egnar metingar.

## Einnýtslu-øki og fleirnýtslu-øki

Tvey grundleggjandi ymisk rák innanfyri býarplanleggingina eru um man ynskir einnýtslu-øki, ið verða nýtt til eitt endamál ella fleirnýtslu-øki, ið verða nýtt til fleiri endamál. Ella sagt á býarplanleggingarmáli: "mono-funktionell areal" ella "multi-funktionell areal". Higartil hevur føroysk planlegging næstan bara satsað upp á at býta øki upp, soleiðis at tey einans kunnu nýtast til lík endamál: Nøkur øki eru skipað sum bústaðarøki. Nøkur øki eru skipað sum íðnaðarøki. Nøkur øki eru skipað sum frítíðarøki. Og nøkur øki eru skipað sum landbúnaðarøki. Øll hesi økini plaga so at fáa ymiskar litir á kortinum yvir sokallaðu "býarskipanina", ið nógvar føroyskar kommunur hava í dag.

At nýta øki til lík endamál hevur nógvar fyrimunir. Fyri tað fyrsta er tað rímiliga einfalt at umsita, men harumframt gevur tað eina sera greiða heildarmynd av hvussu býurin skal mennast.

## Vitanarsamfelagið krevur fleirnýtsluøki

Hetta at býta býir og landaøki upp í øki ella sonur, hevur víst seg at riggað væl í íðnaðarsamfelagnum, har tað hevur verið ynskiligt, at fólk ikki skuldu búgva í skitnum og larmandi íðnaðarøkjum, eins og tað hevur verið ynskiligt, at tað hava verið nøkur fríøki og almenn øki nær við bústaðarøkini. Og hetta gevur sum heild framvegis góða meining í dag.

Men tað skerst ikki burtur, at Føroyar – og her serliga Tórshavn – eru á veg at skipa seg sum eitt vitanarsamfelag. Eitt vitanarsamfelag er eitt samfelag, har fleiri fólk arbeiða við vitan enn við handligum arbeiði.

Í vitanarsamfelagnum er tað ikki longur einans lokaliseringin av tilfeingi, arbeiðsmegi og samferðslumøguleikum, ið avgera hvar vinnulív og íbúgvar lokalisera seg. Í vitanarsamfelagnum koma nakrir aðrir faktorar fram sum lívsvirði, atkomuleiki, mentan, rúm til at liva, fjølbroytni og tolsemi. Í útheiminum er tað soleiðis, at býir satsta upp á slíkar "bleytar faktorar" fyri at fáa sonevndar "vitanar-arbeiðarar" at flyta til og støðast.

Tí er neyðugt, at býir ikki einans hava nógvar funktiónir, men at hesar funktiónir eisini bræðast saman í fjølbroytt og spennandi øki. Økini skulu innihalda eitt sindur av øllum fyri at vera áhugaverd: bústaðir, mentan, handlar, matstovur, torg og lundir, har fólk kunnu dvølja.

Eitt einnýtslu-øki hevur nevniliga tann trupulleika, at har einans er aktivitetur ein part av degnum, meðan fleirnýtslu-øki ofta verða nýtt alt samdøgrið.

## Góðleikar í býnum

Gilli Trónd legði í sínum fyrilestri sera stóran dent á "góðleikarnar" í býnum, tað, ið amerikanski "býarbúskaparfrøðingurin" Edward Glaeser hevur nevnt "Urban Amenities". Gilli tók fram fýra høvuðsbólkinar av góðleikum:

- At tað er eitt stórt úrval av tænastum og brúkaravørum.
- At fysisku karmarnir og fagurfrøðin eru í lagi.
- At almennu tænasturnar eru í lagi.
- At møguleiki er at ferðast millum góðleikarnar innan rímiliga tíð.




Og tað vísir seg, at hetta síðsta er nakað av tí truplasta at fáa at eyðnast. Tórshavn er í dag vaksin út um øll mørk, og hetta merkir, at fyri at koma frá einari funktión til eina aðra, er ofta tørvur á at flyta seg við bili ella við bussi. Tað kann skoytast upp í, at eisini nógvar av grannakommununum eru funktionelt sameindar við Tórshavnar kommunu í dag, og tað skapar eisini eitt økt ferðslutrýst.

Her kundi eitt uppskot verið í størri mun at skipa Tórshavn í fleirnýtslu-øki, soleiðis at fleiri funktiónir vórðu spjaddar kring um býin, heldur miðsavnaðar í einum býlingi. Sigast skal, at hetta í ávísan mun er við at henda í Hoyvíkshaganum og Stórutjørn, ið eru sniðgivin sum fleirnýtslu-øki.

## Tá grannin skapar vøkstur

Men ein avgerandi trupulleiki við at skapa fleirnýtslu-øki, er at ein setir ymisk áhugamál saman á sama øki. Hetta kann í ringasta føri merkja stríð og klandur, tí at áhugamálini ikki eru sameinilig. Millum annað vil eitt larmandi vinnuøki sjáldan vera sameiniligt við eitt friðaligt bústaðarøki, eins og fleiri handlar í einum øki eisini skapa meiri ferðslu og parkeringstrupulleikar. Tí kann rákið við fleirnýtsluøkjum ikki skiljast sum bara "at sleppa teymunum". Fyri at optimera vælferðina í býnum er neyðugt, at "negativir eksternalitir" verða hildnir niðri.

Umvent er tað eisini nakað, ið eitur "positivir eksternalitetir". Um eitt øki er hugnaligt, er tað í sjálvum sær ein positivur eksternalitetur, tí tað vil merkja, at